# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað dugir ikki, at stjórnin kann koma í minniluta. Hendir hetta aftur, mugu vit hava eitt snarval*
*(Henriette Kjær)*

## Liberiskur generalur viðgongur óhugnalig mannaoffur

**Fyrrverandi liberiski uppreistrarleiðarin Milton Blahyi viðgongur, at hann og menn hansara ofraðu børn undir borgarakrígnum**



*Milton Blahyi. Í dag er hann kristin trúboðaði og biður um fyrigeving fyri sínar illgerðir*
*(Mynd: Polfoto)*

Í dag er tann 37 ára gamli Milton Blahyi kristin trúboðari, men í heimlandinum er hann kendur sum „Tann nakni ørvitisgeneralurin" frá borgarakrígnum, tí hann var altíð nakin, tá hann var í bardaga. Nú viðgongur hann, at hann var við til at ofra fólk, tí tað kundi tryggja honum og monnum hansara sigur.

Sambært BBC hevur Milton Blahyi greitt frá, at hann var fleiri ferðir við til at ofra fólk fyri at vinna borgarakríggið. Tað hendi eisini meiri enn so, at teir ofraðu børn, og at teir tóku hjartað úr teimum og ótu tað, sigur hann.

Tað hevur leingi ljóðað, at summir bólkar í liberiska borgarakrígnum ofraðu fólk, men sambært BBc er hetta fyrstu ferð, at nakar alment váttar, at tað var so. Undir avhoyringum hevur fyrrverandi generalurin greitt frá, at menn hansara beindu fyri umleið 20.000 fólk undir borgarakrígnum.

Í dag er Milton Blahyi kristin trúboðari, og hann hevur fingið sær navnið Jósef. Hann sigur við BBC, at hann iðrar seg um illgerðirnar og at hann hevur biðið síni offur um fyrigeving.

## Noyðist at vátta sína trúgv aftur og aftur

**Ferð eftir ferð noyðist Barrack Obama at greiða frá, at hann er ein góður kristin amerikanari**



*Barrack Obama noyðist at sanna, at í USA kann tað vera óheppið at hava muslimskan pápa og at eita Hussein til millumnavn*

- Eg bleiv tikin í eið, meðan eg hevði hondina liggjandi á Bíbliuni. Eg havi verið limur í teirri somu kristnu kirkjuni í meiri enn 20 ár, segði Barrack Obama á veljarafundi í South Carolina sunudagin.

Tað er ikki fyrstu ferð, at hann noyðist at vátta sína kristnu trúgv alment. Í seinastuni hava nógvir amerikanarar fingið eitt teldubræv, har sagt verður, at Barrack Obama er muslimur, og at hann tískil kann vera ein yvirgangsmaður í amerikonskum klæðum. Í teldubrævinum stendur eisini, at hann legði hondina á Koranina, tá hann bleiv tikin í eið sum senatorur.

Í amerikonsku suðurstatunum hevur trúarspurningurin hjá teimum einstøku valevnunum stóran týdning, og tí hevur Barrack Obama gjørt nógv burturúr at mana leysasøgurnar í jørðina.

Upprunin til leysasøgurnar um hansara muslimsku fortíð er, at bæði pápi og fosturpápi hansara vóru muslimar, at hann hevur gingið í skúla í tí muslimska Indonesia, og so eitur hann Hussein til millumnavn. Tað skal tó sigast, at í Indonesia gekk hann í einum katólskum skúla.

### STUTT SAGT

#### Fimm hermenn fullu

Vápnaðir islamistar søktu í nátt at einari legu hjá pakistanska stjórnarherinum, og tá álopið hasaði av, lógu fimm stjórnarhermenn eftirá, og sjey aðrir vóru særdir. Herleiðslan sigur, at legan er í útnyrðingspartinum av landinum og stutt frá afghanska markinum. Har hava pakistanskir hermenn verið í hørðum bardøgum við víðgongdar islamistar tær seinastu vikurnar, og báðir partar hava mist fólk. Stjórnarherurin hevur hert átøkini við afghanska markið og leitar eftir manninum, sum eftir øllum at døma gav boð um at myrða Benazir Bhutto.

#### Illar flogternur

Felagið hjá flogternum í Teilandi er sera misnøgt við, at ein sjónvarpsstøð sendir eina røð, har flogternur klandrast um flogskipararnar. Í gjár vóru umboð fyri flogternurnar hjá Thai Airways á skrivstovuni hjá sjónvarpsstøðini við einum formligum mótmæli. Leiðslan í Thai Airways heldur lítið um sendirøðina, tí eftir felagsins tykki er arbeiðið hjá flogternunum meiri álvarsamt enn tað, sum sendirøðin gevur hyggjarunum eina fatan av. Thai Airways og eitt annað teilendskt flogfelag, Bangkok Airlines, ætla nú at senda stjórnini eitt bræv við áheitan um at biðja sjónvarpsstøðina taka sendirøðina av skránni.

#### Koyra diplomat til hús

Myndugleikarnir í Letlandi hava givið einum russiskum diplomati boð um, at hann er óynsktur í landinum, og at hann tí eigur at fara aftur til Russlands sum skjótast. Sagt verður, at dioplomaturin hevur fingist við virksemi, sum ikki er sambariligt við hansara støðu sum diplomatur. Hetta orðalagið verður vanliga brúkt, tá diplomatar verða lagdir undir njóðning. Uttanríkisráðið í Riga sigur, at diplomaturin er vístur av landinum orsakað av upplýsingum, sum trygdartænastan hevur útvegað um hann.